# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 10. oktober 2019
Mál nr.: 19/00337-3
Málsviðgjørt: JEK

**Løgtingsmál nr. xx/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald og løgtingslóg um áseting av skatti** (Heimavirki)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald og løgtingslóg um áseting av skatti

(Heimavirki)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 7. mai 2019, verður gjørd henda broyting:

§ 2, stk. 3, litra l verður orðað soleiðis:
"l) Rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi, heruppií heimavirkisvirksemi"

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 181 frá 21. desember 2018, verður gjørd henda broyting:

Aftaná § 8a verður sett:
"**§ 8b.** Inntøka av heimavirkisvirksemi verður bruttoskattað við 15%. Bert tann parturin av inntøku frá heimavirkisvirksemi, sum fer upp um 50.000 krónur árliga, verður skattaður Inntøka, skattað eftir hesum stykki, verður ikki tikin í skattagrundarlagið í § 1. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri, hvussu heimavirkisvirksemi skal skilmarkast.
*Stk. 2.* Inntøka av heimvirkisvirksemi kann í staðin fyri at verða skattað eftir stk. 1 verður skattað eins og onnur inntøka. Inntøkan verður tá tikin við í skattagrundarlagið í § 1 uttan botnfrádrátt."

**§ 3**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2020.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**
**1.1. Orsakir til uppskotið**
Endamálið við uppskotinum er at taka burtur forðingar fyri føroyskum heimavirkisvirksemi, ið eru í skatta- og avgjaldslóggávu.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Heimavirki er eftir galdandi lógum vanliga skattskyldugt og meirvirðisgjaldskyldugt. Hetta merkir, at vinningur í sambandi við sølu av heimavirkaðum vørum er skattskyldugur. Selur ein persónur fyri meira enn 30.000 krónur í einum ári, er hann eisini skyldugur at lata seg meirvirðisgjaldskráseta og skal gjalda meirvirðisgjald av allari søluni.Tá talan er um heimavirki, er í flestu førum talan um ítriv og ikki vinnu. Sum kunnugt er skattliga viðgerðin nakað ymisk, um talan er um ítriv ella vinnu.

Á TAKS verður upplýst, at sera lítið verður uppgivið av inntøku stavandi frá heimavirki. Hetta er galdandi, bæði tá talan er um uppgerð av skattskyldugu inntøkuni og uppgerð av meirvirðisgjaldsinntøkuni.

Á TAKS verður eisini upplýst, at nógv fólk ringja til stovnin við spurningum um skatting av heimavirki, og hvussu vorðið er við meirvirðisgjaldi av heimavirki.

Heimavirki hevur røtur í aldargamlari siðvenju her á landi, og er soleiðis ein týðandi partur av okkara mentan, og í stóran mun er eisini talan um list. Størsti parturin av heimavirki verður útintur av kvinnum, ið virka pløgg úr ull, men eisini er talan um at virka lutir burtur úr træi, hornum, gróti o.ø.

Fólk, ið fáast við heimavirki, eru ørkymlað av skatta- og meirvirðsgjaldspurningunum, og hetta heldur teimum aftur í teirra virksemi. Tí er skilagott at broyta lóggávuna soleiðis, at fólk kunnu fáast við heimavirki uttan alla tíðina at hava ampa av skatta- og mvg-viðurskiftum.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Endamálið við uppskotinum er at fjálga um heimavirki í Føroyum. Hetta er jaligt, tí talan í mongum førum er um aldargamla siðvenju og í mongum førum eisini um list. Stórur partur av heimavirkaðu vørunum verða seldar til ferðafólk, og tí kann eisini roknast við, at uppskotið verður við til, at meira kann fáast burtur úr ferðavinnuni.

Í § 2, stk. 3, litra l) í meirvirðisgjaldslógini er rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi undantikið meirvirðisgjaldi. Skotið verður upp at víðka hesa áseting til eisini at fevna um heimavirkisvirksemi.

§ 8a í ásetingarlógini gevur heimild til bruttoskatting av leiguinntøkum. Skotið verður upp at gera eina líknandi skipan fyri heimavirkisvirksemi. Ítøkiliga verður skotið upp, at inntøka av heimavirkisvirksemi verður bruttoskattað við 15 %, men tó soleiðis, at bert tann parturin av inntøku av heimavirkisvirksemi, sum fer upp um 50.000 krónur, verður skattaður. Eins og við leiguinntøkum skal tað vera valfrítt at nýta hesa skipan. Hugsa vit t.d. um at binda, so kostar tógv umleið helvtina av søluprísinum. Um viðkomandi hevur selt fyri meira enn 50.000 kr., skal skattur rindast av tí, sum er omanfyri. Tá merkir ein 15% skattur av søluprísinum umleið 30 % av lønini.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Samanumtikið hevur uppskotið við sær,

- at inntøkur frá heimavirkisvirksemi verða frítiknar fyri meirvirðisgjald

- at inntøka frá heimavirkisvirksemi verður bruttoskattað við 15%, men tó soleiðis, at bert tann parturin av inntøku frá heimavirkisvirksemi, sum fer upp um 50.000 krónur, verður skattaður.

### 1.5. Ummæli og ummæliskjal

Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Føroya Heimavirkisfelag, TAKS og Vinnuhúsinum.

Harumframt varð uppskotið sent Løgmansskrivstovuni til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommur

Tá sera lítið verður givið upp til skattingar í dag frá sølu av heimavirkaðum vørum, fer uppskotið ikki at kosta almennu kassunum stórvegis. Hinvegin má roknast við, at um søla av heimavirkaðum vørum formliga verður gjørd skattafrí ella lutvís skattafrí, kann roknast við, at heimavirkisvirksemi fer at økjast.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at uppskotið kemur at hava jaligar umsitingarligar avleiðingar

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður, at uppskotið kemur at hava jaligar avleiðingar fyri vinnuna

Um søla av heimavirkaðum vørum formliga verður gjørd skattafrí ella lutvís skattafrí, kann roknast við, at heimavirkisvirksemið fer at økjast.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri tey, sum fáast við heimavirkisvirksemi.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið er ikki tengt at millumtjóða sáttmála.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Marknaforðingar

Uppskotið hevur ikki við sær marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið ber í skatta- og avgjaldslækking fyri tey, sum takast við heimavirkisvirksemi.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsból kar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar Avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Talan er um í meirvirðisgjaldslógini at frítaka heimavirkisvirksemi fyri mvg-skyldu eins og rithøvunda- og tónaskaldavirksemi og annað listarligt virksemi.

**Til § 2**
Gjørd verður ein bruttoskattaskipan til heimavirkisvirksemi lík henni, ið er galdandi fyri leiguinntøkur. Inntøka av heimavirkisvirksemi verður soleiðis bruttoskattað við 15 %. Tó so, at bert tann parturin av inntøku av heimavirkisvirksemi, sum fer upp um 50.000 krónur, verður skattaður. Eingir aðrir frádráttir verða loyvdir.

Borgarar kunnu sjálvir gera av, um teir velja hesa skipan ella at lata inntøkur frá heimavirkisvirksemi skatta á vanligan hátt. Velja teir at lata inntøkuna skatta á vanligan hátt, skal hon leggjast saman við aðrari inntøku, tá skattskylduga inntøkan verður gjørd upp. Útreiðslur, ið standast av at vinna inntøkuna, kunnu tá dragast frá.

**Til § 3**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 10. oktober 2019

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá